## DAGSINS MEINING

# Kirkjan hevur annað uppiborið

Nú skulu prestar, kirkjuráðslimir og bispur og dómpróstur "hoyrast", áðrenn fólkakirkjan verður yvirtikin! Ella skulu hesi, sum á ein ella annan hátt varða av kirkjuni, takast upp á ráð kortini?

Landsstýrismaðurin í kirkjumálum líkasum broytti áskoðan, eftir at løgmaður hevði sagt nøkur álvarsorð – ella sett landskonuna upp á pláss – men so tóktist, sum hon kortini vendi einaferð afturat. Ella er tað ein misskiljing? Nú fáa vit at síggja.

Tann stóri stríðsspurningurin, nú ætlanin er at yvirtaka kirkjuna, er, um yvirtøkan skal fyrireikast væl og virðiliga, ella um yvirtøkan bara skal skundast ígjøgnum. Tá málið tók seg upp næstsíðsta vikuskiftið, vísti formaðurin í prestafelagnum Jákup Reinert Hansen á, at teir vórðu ikki hoyrdir, nú kirkjan skal koma undir føroyskt stjórnarvald.

Grundgevingin hjá Anliss Bjarkhamar var, at hon hevði sett sær fyri í fyrstu atløgu at fáa kirkjuna undir føroyskan myndugleika. Síðani kundu prestar, kirkjuráðslimir, próstur og bispur stinga út í kortið, hvussu tann føroyska fólkakirkjan skuldi skipast.

Men hesum hóvaði hvørki prestum, andstøðuflokkum og so vísti tað seg eisini, at í mannagongdin var eisini í stríð við samgonguskjalið, sum sigur nakað um, at yvirtøkan skal gerast í samljóð við allar partar í hesum máli. Eisini er ætlanin at yvirtaka fólkakirkjuna í andsøgn til aðraryvirtøkur, sum allar eru fyrireikaðar væl ov virðiliga, áðrenn tær koma undir føroyskt ræði.

Sum ikki einaferð dugur Tjóðveldisflokkurin ikki hógv. Hvørja ferð Tjóðveldisflokkurin skal yvirtaka eitt mál, ella standa á odda fyri nøkrum, sum skal bera á sjálvstýrisleið, verður rok og stígur kemur í. Samstundis sum aðrir landsstýrismenn – enntá sonevndu sambandsmenninir í Fólkaflokkinum – klára at skipa fyri yvirtøkum so væl, at tað gongur sum eftir smurdum lunni.

Í summum førum hava andstøðufólk róð upp undir, at hetta hevur Tjóðveldisflokkurin gjørt tilvitað fyri at fáa rok í mótvegis dønum, so fíggindamyndin framvegis kann standa klár í hugaheimi føroyinga. Men í hesum føri er ikki stríð við danir, men við sjálva "geistligheitina".

Hetta er spell. Kirkjan hevur týdning fyri flestu føroyingar og hon er ein partur av føroyska samleikanum. Tí eigur henda yvirtøkan at skipast væl og skynsamt, so vit fáa eina føroyska fólkakirkju, sum flest møgulig kunnu fegnast um. Kirkjan og tey mongu, sum gera ólønt arbeiði innan kirkju okkara, hava annað uppiborið enn ta gongd, sum hevur tikið seg upp.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ignoransa og inhabilitetur

**Mouldi Manai**



Eftir at hava lisið greinina hjá Ingolvi S. Olsen í Dimmuleygardagin 31. aug., havi eg ikki havt hug at gjørt meira við málið beint nú. Men eg má siga, at eg ikki kundi lata vera, tá ið eg las teigin "meiningar" í Dimmu mikudagin 4. sept., har Høgni Hoydal skrivar aftursvar til, sum hann sjálvur nevnir tað, rasismu, persónliga niðurgering, jantulóg og fordómar, sum Dimma borðreiddi við leygardagin 31. aug.

Eg má siga, at eg í byrjanini av aftursvarinum hjá Høgna føldi tað, sum at hann vísti til greinina, ið varð skrivað um meg sjálvan sama leygardag. Somuleiðis sum Høgni eri eg sera ovfarin av, at Dimma velur at prenta sovorðnar leysasøgur og letur ein tíðindamann skriva alt hatta, sum um tað er sannleiki og at hann hevur prógv fyri tí, ið hann í greinini fóðrar Føroya fólk við.

Og er tað har, eg meini at tað gongur galið.

Har er nevniliga einki sum helst hald í tí hann skrivar, og kundi hann heldur ikki geva mær nakað prógv fyri tí, ið hann skrivar, tá ið eg tosaði við hann týsdagin 3. sept. Eg føldi meg so órættvíst viðfarnan og persónliga forfylgdan av hesum, og áðrenn eg visti av, sat eg og gav honum langa frágreiðing um, hvussu alt hekk saman. Tá fann eg útav, at hann,t.d. viðv. málinum um kvinnu, sum er í ætt við meg, og sum eg sambært honum skal hava misbrúkt og ikki givið løn síðani mai í ár, er so langt úti vegna manglandi research, at eg føli meg noyddan at greiða frá.

Fyri tað fyrsta hevur kvinnan ikki arbeitt hjá mær síðani apríl mánað, og sjálvandi ikki fingið løn síðani tá. Og hesin sáttmálin við kvinnuna, sum hann pástendur geldur til 1. nov. í ár,er nevniliga eingin sáttmáli men bert ein arbeiðsgevaraváttan, sum hon skal vísa fyri myndugleikunum sum prógv fyri, at hon hevur arbeiði og sostatt hevur loyvi at vera í landinum. Hin sáttmálin gekk út 1. nov. 2001, og hava bæði eg og kvinnan síðani tá verið leys av hvørjum øðrum. Maðurin hjá hesi kvinnu skuldi eisini sambært Dimmu vera fyrrverandi medeigari hjá mær, og mær vitandi hevur viðkomandi ongantíð verið tað. Hevði eg so mikið sum verið spurdur um málið, kundi eg sagt honum beinanvegin hvat pappíri innibar. Eftir at hava sagt Ingolvi frá, hvussu alt hongur saman, fekk eg boðið eina rætting í blaðið, men nei takk. Tann, ið hevur valt at svína meg til, fari eg ikki at lata vaska mær.

Eg meini tí, at mátin, sum tíðindamaðurin hevur ført seg fram, er fullkomiliga burturvið, og undrist eg mest av øllum á, at Dimma borðreiðir við slíkum. Hetta er bert eitt av dømunum í greinini, sum vísir, at blaðmaðurin als ikki hevur kannað um nakað høpi er í leysasøgunum, hann hevur hoyrt. Hetta minnir meg ikki sørt um Ekstra Blaðið. Ignoransa og inhabilitetur eru bert nøkur av orðunum, ið eg kann siga um hesa grein, og loyvi eg mær veruliga at ivast í, um familju-, vina- og kenningapolitikkurin ikki eisini er tað, ið dreiv verkið hjá tíðindamanninum í hesum føri.

# Til Niels Una Dam

**Dánial á Dul Jacobsen**



Um nú Føroyar vóru muslimskar í staðin fyri kristnar, og tú Niels Uni Dam hevði skrivað á sama hátt um islam, sum tú skrivar um tey kristnu í sosialinum leygardagin, so hevði tú neyvan fingið stundir at lisið hetta aftursvarið. Vart tú á lívið, kundi tú prísað teg lukkuligan, og tað hevði tú neyvan gjørt, vart tú staddur her á landi. Ivast tú í hesum, ger so eina roynd at fáa fatur í Salman Rushdie og vita, hvat hann heldur. Ella, hví er tað neyðugt hjá jødum í Danmark at fáa politiverju? Er tað tí, at tey kristnu hava sett tey á deyðslista?

Veit ikki um tú skilir tað, men gleði tín yvir talifrælsi annara osar av hykli. Nakað í tráð við at onkur kemur til tín, og slær teg meir ella minni í ørviti, og gjøgnum tokutám hoyrir tú viðkomandi bedýra, at hann elskar teg.

Tú skírir onnur svøk, svín, svíkjarar og sjálvútrópt. Kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvør hevur útrópt Niels Una Dam?


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Tobbi sigur: skralltómir bussar Eg sigi: skralltómi Tobbi!!

**Hugo Skorastein**
*Sambandsmaður og fyrrverandi bussførari*

Nú kjakið enn einaferð hevur tikið seg upp um skálafjarðaleiðina, skuldi Tobbi eisini gera seg inn á bussarnar har á leiðini. Og tað ljóðaði, sum visti hann hvat hann tosaði um. Men tað skal eg pína uppá at hann ikki ger.

Navnið er Hugo, og havi eg til fyri stuttum, koyrt bygdaleiðir á Tobba'sa leið í knapt 2 ár. Mangan sá eg Tobba har, við ballini hangandi í øðrum munnklovanum, spaserandi í túni sínum, uttan at vita av, at hann har niðri gekk og ilnaðist um, at eg koyrdi, við hansara oðrum »við skralltómum bussi«.

So má eg spyrja, hvussu veit Tobbi um bussurin var tómur ella ei? Var hann har? Áh nei, tí so var bussurin jú ikki »skralltómur« meir. Hvat trupulleikar Tobbi hevur at dragast við, veit eg ikki, men um hann sjálvur heldur tað vera ov dýrt at brúka bussin á síni leið, so kann eg vissiliga spara honum nøðkur oyru har. Ein ferðaseðil frá Skipaneskrossinum, har ið eg havi sæð Tobba fleiri ferðir staðið og bíða eftir Leið 400 á veg á flogvøllin um morgunin, til flogvøllin kostar 110kr, men tað veit Tobbi væl. Tað eg ikki, fyrenn nú, kann læra Tobba, er at frá buss steðgi staðnum beint oman fyri húsinum hjá Tobba kostar ferðaseðilin eisini 110kr. Har kanst tú Tobbi spara eina rúgvu, í staðin fyri at koyra við bensin drivna Volvo bilinum inn á krossin, kundi tú tikið bussin. Tú sigur jú sjálvur at hann er Skralltómur, so plásstrot skuldi ikki verið naðkar vandi. Og eitt atrat. Tobbi situr á Fólkatingið og reisur tí tíðum til flogvøllin, keyp eitt 10-túrakort, tá sparir Tobbi aftur 20% av vanliga ferðaseðlaprísinum, so tað sum annars kostaði 1100kr fyri 10 túrar av Skipaneskrossinum til flogvøllin, kann Tobbi fáa av Glyvrum til Flogvøllin fyri undir 1000, nærri 900kr. Hatta kanst tú Tobbi ikki vita av, tí at eg tey bæði árini eg koyrdi har á leiðini ongantíð havi sæð teg í bussinum, og tað er ikki tí, at mínum eygum feila nakað sum helst, eiheldur tí at Tobbi ikki sæst, men tí Tobbi, líka lítið sum Anfinn Kallsberg, Eyðun Eltør, Karstin Hansen, Vilhelm Johannesen og Heini í Kunoy fyri at nevna nakrar, brúka bussin meira enn hægst neyðugt. Og tað er nokk ikki so galið at hava bussin at líta á allíkavæl, tí at hann er rættiliga nógv bíligari enn t.d. ein hýruvognur.

Sum eg segði við bilføraran, sum einaferð skræddi seg um bussføraranar í vikublaðnum á sinni, somuleiðis sigi eg við teg Tobbi, undurbygg tíni sjónarmið, áðrenn tú gloppar munnklovan, ella halt bara gák. Tá gert tú so einki galið.

# Digitalisera sendinet í Føroyum!

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*



Eg vil alment loyva mær at siga, at tíðin er farin frá analogiskum skipanum hjá Føroya Tele og hvat sendineti viðvíkur, hvat øll skulu gera sær greitt í dag. Vit eiga at krevja at fáa eitt nýtt digitaliserað sendinet, ið skal umfata bæði útvarp og sjónvarp og ikki bert televarpið, so slepst undan kappingaravlagan í næstum.

Eg vil vísa á møguleikan at fáa lækkað kostnaðarstøðið hjá bæði útvarpi og sjónvarpi og sleppa øllum lurtarum, hyggjar undan bæði útvarps- og sjónvarpsgjøldum. Vit vilja yvir longri tíðarskeið fáa bíligari útvarp og sjónvarp, tá hesi hava fingið sítt digitaliseraða sendinet og upptøku- og redigeringshøli í Havnini í næstum.

Vit eiga at krevja av landspolitikarum at bæði útvarp og sjónvarp koma á løgtingsins fíggjarlóg sum skjótast, ið kann fíggjast umvegis skattin hjá øllum føroyingum. Eg haldi, at vit skulu fáa lokal útvarp og sjónvarp úti í størri útjaðaraoyggjum og fáa samsendingar við útvarp og sjónvarp og fáa meira av lokal tilfari.

Tað er tíð uppá at útvarps- og sjónvarpsfólk taka hesi viðurskifti upp til viðgerðar á fundum og fyrireika seg til kappingina á fjølmiðlaøkinum seinni í heyst. Tað hevði verið gott at fingið útvarp og sjónvarp dagført og útbygt sínar heimasíður, so føroyingar bæði heima og uttnalands kunnu fylgja meira við øllum. Digitaliserað sendinet fyri alt landið kann sleppa okkum undan frumskógar parbolum á húsatekjum og á húsaveggjum og úti í garðinum í øllum Føroyum.

Hvussu verður við øllum eigarafeløgunum í Havn í heyst, tá ið televarpið byrjar sínar sendingar og at skapa kapping mótvegis sjónvarpi og útvarpum? Hvussu verður við radio- og teldufyritøkum og handlum í Føroyum, tá heimateldan verður kappingarneytin.

P.S. Eg komi aftur til hetta!

# Til Skýmaskotshøvundan á Dimmu

**Christian M. Poulsen**



Ikki veit eg, hvør navnleysi dimmimaðurin á baksíðu dimmu er (4.-9-02); men at fara eftir manninum og ikki eftir bóltinum, hevur vanliga verið hildið at vera vána blaðetikkur og undir mjadnunum. Um skuggamaðurin hevur ilt millum stórutærnar og mjadnarnar, er stavitarnaður ella hitt, er ilt at vita.

At viðgera (kritisera) eina sendirøð uttan at viðgera sendingarnar, er framhaldandi vána blaðetikkur. Og at leggja eftir einari heilari familju er so hermafroditkent, at tú øtast.

Skuggamaður - eina heilsan skalt tú fáa frá mær:

"Mítt land hevur fostrað eitt ravnaslag, fegnast tað flýgur um nætur; sum havhestur sprænir lýsi, tað spýr eiturkynt, svíðandi hatur."

# Hvussu nógv kostar ein Sandoyingur?

**Páll á Reynatúgvu**
*Tjóðveldismaður og sandoyingur*



Aftaná at hava hoyrt skakandi etnisku roknistykkini hjá donsku stjórnini, kom tað ikki so óvart á, nú "nýggja dimma" tók tráðin upp eftir donsku lagsbrøðrunum. Vit Sandoyingar eru teir fyrstu sum skulu stúvast niður í nýfunna etniska sambandsroknileistin.

Gamaní. Tað er freistandi hjá einum ungum p e r m u s t r e m b a n d i "journalisti"at lofta nøkrum tølum, elta teimum saman við nøkrum bókstavum og hokus pokus! So nógv kostar ein Sandoyingur!

Uttan á nakran hátt at viðurkenna mær ábyrgdina av tí máta landsins politikarar hava roynt at loyst tann partin av føroyska samferðslukervinum, sum í dag eitur Meginøkið, Hestur, Sandoy, Skúvoy, so noyðist eg at viðganga ein farra av firtni, ella rættari sagt, innigyrdum fananskapi, nú eg sum sandoyingur og føroyingur, fyri aðru ferð innan eina viku verið bókførdur sum ein etnisk útreiðslukonto í hálovaða ríkisfelagsskapinum.

Sjálvur dugi eg, og nokk aðrir sandoyingar við mær, illa at síggja hví júst henda søgan skuldi varpast upp, og ei heldur við hvørjum endamáli! Um greinin hjá F.J. varð tann fyrsta av 30 viðvíkjandi samlaðu samferðsluútbyggingini í føroyum, og hon bygdi á sakligt og væl granskað tilfar, so varð okkurt eg kundi lært av greinini.

Er endamálið hinvegin at fáa staðfest at vit Sandoyingar kosta samfelagnum meira enn gott er, so eigur viðkomandi skribentur at spenna sær skallan nakað betri, og lofta hinum tølunum sum eru við til at mynda samlaða rakstrarúrslitið fyri ymsu partarnar av landi okkara.

Sjálvur leggi eg einki at gera okkum í Sandoynni meir ella minni verd enn frændir okkara aðrastaðni í landinum. Sundurlyndi er nokk av, men ikki hevði tað verið heilt av leið um hesin góði F.J.,líkasum til stuttleikar, enn einaferð spenti sær bollan, og roknaði eitt nú hvusssu nógv Sandoyggin lat føroyska samfelagnum av framleiðsuágóða og hinvegin tók aftur í almennum tænastum. Ikki er vist at etniska økið Sandoyggin tá varð skrivað við reyðum tølum í landsrokniskapinum.

Annars er tað nokk so at alt føroyska samferðslukervið, tíbetur kann nýtast bæði aftur og fram, av øllum landsins borgarum og gestum við. Eisini av F.J.